# Behagiligast fyri bøðilin

**BØÐILIN** - Kanska hevur druknideyðin verið so nógv brúktur, tí tað er tann mátin, sum er behagiligast fyri bøðilin, sigur Jóannes Nielsen

Tað er týðiligt, at tað kemur rættiliga óvart á Jóannes Nielsen, at hann nú er í vanda fyri at verða meldaður fyri at hava druknað tveir kettlingar.

- Hetta er vanligi mátin, sum vit hava brúkt nú í rættiliga nógv ár fyri at halda húsdjórastovninum niðri, sigur hann í eini stuttari viðmerking.

- Skal tað nú vera revsivert, má tað vera onkur nýggj siðvenja, sum hevur stungið seg upp, leggur hann afturat.

Men heldur tú so, at hetta er rætti mátin at avlíva djór uppá?

- Eg veit ikki, hvussu druknideyðin er og tað er nokk øgiliga tórført at dokumentera, hvussu tann deyðin følist hjá einum djóri.

- Sjálvandi ber tað til at sláa høvdið í stein og tað er kanska ein virðiligari deyði at fáa enn at drukna. Tað er kanska enntá uppaftur effektivari at svevja eitt djór. Men tá er mann sjálvur involveraður upp á nokk so groteskan mátan.

- Kanska hevur druknideyðin verið so nógv brúktur, tí tað er tann mátin, sum er behagiligast fyri bøðilin, sigur Jóannes Nielsen.

Vit fingu ikki orðið á Katrina Óttarsdóttir, áðrenn evstamark og tað eydnaðist heldur ikki at fáa eina viðmerking frá Kringvarpinum.

Men, so vítt, vit hava fingið uppspurt, eru ongar reaktiónir komnar uttanlands upp á kettlinga-brotið í filminum og ongin hevði væntað, at fyrsta átalan skuldi koma hiðani úr Føroyum.

# Soleiðis ger mann ikki nú á døgum

- Hetta ein ringur máti at avlíva djór upp á.

Signar Petersen, djóralækni, ivast ikki í, at tað er brot á djóraverndarlógina at drukna kettlingar.

Hann sigur, at eftir djóraverndarlógini er tað eitt krav at fyribyrgja, at eitt djór ikki pínist óneyðugt, tá ið tað verður avlívað.

- Tann, sum druknar eitt djór, livir ikki upp til hetta kravið, sigur hann.

Hann er greiður yvir, at tað hevur verið vanlig mannagongd í Føroyum at drukna kettlingar og hundahvølpar.

Hann heldur kortini, at nú eiga vit at verða komin eitt sindur longri enn tað, eitt sindur longri enn tað.

- Soleiðis ger mann ikki nú á døgum, leggur hann afturat.

Hann staðfestir, at besti og mest pínleysi mátin at avlíva eitt djór, er at fara til djóralækna við tí, har tað verður doyvt, so at tað ikki vaknar aftur.

Men hann heldur kortini, at skal tað vera, er tað frægari at skjóta eitt djór enn at drukna tað, tí tá ið tað er skotið, er tað vekk alt fyri eitt.

Hann heldur eisini, at tað er frægari at sláa høvdið í stein á einum nýlagdum kettlingi, heldur enn at drukna hann.

- Er rætt atborið tá ið ein nýlagdur kettlingur verður sligin í stein, er hann eisini vekk alt fyri eitt, tí tá er skallabeinið so bleytt, at tað tolir lítið av. Í øllum førum missir hann vitið alt fyri eitt.

- Men at drukna ein kettling er í veruleikanum ein tann vánaligasta loysnin, sigur Signar Petersen.



DJÓRAPÍNSLA

*Eitt av okkara fremstu skaldum og rithøvundum, Jóannes Nielsen, hevur fingið Djóraverndarfelagið eftir sær, tí hann hevur druknað tveir kettlingar á filmi. Hetta kemur óvart á høvundan sjálvan*

# Jóannes Nielsen lagdur undir at pína kettlingar

**DJÓRAPÍNSLA** Kendi føroyski rithøvundurin og yrkjarin, Jóannes Nielsen, er blivin miðdepilin í einum máli um djórapínslu og hann kann nú vænta at verða meldaður

Áki Bertholdsen

- Hetta er eitt ræðuligt dømi um manglandi virðing fyri djórum.

Tað er skoðsmálið, sum Rúni Nielsen, næstformaður í Djóraverndarfelagnum, gevur einum broti í nýggja og væl umtókta filminum um Jóannes Nielsen, víðagiti skald og rithøvundur.

Í tí eina brotinum í filminum, sum Katrin Óttarsdóttir hevur gjørt, hevur kettan hjá skaldinum lagt tríggjar kettlingar og Jóannes Nielsen hevur tikið á seg av avlíva tveir av teimum, ímeðan tann triði slapp at liggja eftir hjá løðuni.

Men tað er mátin, sum Jóannes Nielsen avlívar kettlingarnar upp á, sum rættiliga hevur stoytt tey í Djóraverndarfelagnum.

Í filminum síggja vit Jóannes Nielsen beina fyri kettlingunum við at tveita teir í havið Yviri við Strond og drukna teir.

Vit síggja hann taka teir báðar nýlagdu kettlingarnar, koyra teir í ein plastposa við einum steini og tveita teir út av helluni og á sjógv.

- Øll hava krav upp á eitt virðiligt lív, og øll hava krav upp á ein virðiligan deyða, staðfestir Rúni Nielsen.

Hann staðfestir samstundis, at tá ið eitt djór verður druknað, er tað alt annað enn ein virðiligur deyði og hann heldur, at hetta er eitt ræðuligt dømi um hugburðin, ið summi hava til djór.

Hann staðfestir samstundis, at hetta er greitt brot á djóraverndarlógina og tí er tað eitt mál, sum djóraverndarfelagið hevur tikið upp til viðgerðar.

Tí er tað eisini væntandi fyri heilt vist, at felagið fer at melda tilburðin, sigur næstformaðurin.

## Ongan skund

Hann leggur kortini afturat, at málið hevur ikki so øgiligan skund, tí djórapínslan er væl og virðiliga skjalprógvað í filminum.

Tí er heldur ikki avgjørt, hvussu ein fráboðan til løgregluna fer at verða orðað, um tað verður Jóannes Nielsen einsamallur, sum verður meldaður, ella um filmsmakarin, Katrin Óttarsdóttir, skal meldast fyri at staðið fyri útbreiðsluni av slíkum myndum, ella kanska tey bæði tvey.

Men hinvegin sigur Rúni Nielsen, at hann skilir so yvirhøvur ikki, hvussu almenna Kringvarpið vil leggja navn til ein film við slíkum hugburðin mótvegis djórum, sum hesum.

**Tá er mann sjálvur involveraður upp á ein nokk so groteskan máta**

Hóast Djóraverndarelagið ikki hevur meldað enn, hevur felagið kortini kannað málið hjá djóralækna, sum eisini er samdur um, at tað er djórapínsla at drukna eitt djór.

Rúni Nielsen sigur, at tað eru eisini fordømi um, at fólk hava fyri ikki so heilt langari tíð síðani fingið dóm fyri at hava druknað ein hund.

aki@sosialurin.fo